

# Jólabadmintonkapping



Aftur í ár verður skipað fyri einari jólabadmintonkapping.

Fyri at luttaka skal tú:

- Vera 18 ár ella eldri
- Spæla double við skiftandi partnarum
- Vera í góðum lag í góðum selskapi

Tiltakið verður Fríggjadagin 28.desember kl. 15.45 í Badmintonhøllini.

Skráin er hendan:

- Kl. 16- 18.30 badmintonkapping
- Steðgur - brúsa o.a
- Kl. 19.30 døgurði og hugni

Luttakaragjald er 300 kr. fyri hvønn,  íroknað er døgurði, bóltar og drekkivørur o.a. undir kappingini.

Drekkivørur til døgurðan og aftaná er ikki við í prísinum.

Øll melda til á hbf.klubmodul.fo. Tað er frítt hjá øllum at stovna ein vanga, eisini frá øðrum feløgunum, man nýtist ikki at vera limur í HBF, fyri at hava ein vanga har. Tað ber eisini til hjá einum, sum hevur ein vanga, at melda fleiri fólk til kappingina, og avrokna sínámillum.

Skunda tykkum, tað er bert pláss fyri 30 luttakarum.

Vinarliga

HBF